

## Peika á Heðin í Suðuroy

Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag peikar á Heðin Mortensen til formann í Javnaðarflokkinum.

Tað varð greitt, tá felagið í gjárkvøldið hevði fund um, hvønn felagið skal skjóta upp sum formansvalevni í Javnaðarflokkinum.

– Kjak var á fundinum um fyrimunir og vansar, og eisini var lívligt politiskt orðaskifti. Tað var semja millum fundarfólkið um at peika á Heðin Mortensen sum formansvalevni, sigur Henrik Old, formaður í Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag. Hann leggur afturat, at uppmøtingin á fundinum hjá felagnum var betri, enn vanligt.

Freistin hjá feløgunum at stkjóta upp valevni er mikudagin á middegi.




*Fyrsta valstríðið hjá Lars Løkke Rasmussen sum forsætisráðharra sær einki stuttligt út. Men tað ger tað hinvegin hjá Helle Thorning-Schmidt, sum kann fyrireika seg upp á at taka yvir skrvistovuna í Forsætismálaráðnum*

# Helle herjar á Løkke

**FÓLKATINGSVAL Alt bendir á, at Helle Thorning Schimdt fer at hólva Lars Løkke Rasmussen av, tá fólktingsval verður í Danmark**

Eirikur Lindenskov

Hevði fólkatingsval verið í dag, hevði andstøðan vunnið ein greiðan sigur, og Helle Thorning-Schmidt hevði loyst Lars Løkke Rasmussen av sum forsætisráðharra.

Tað vísir ein nýggj meiningakanning, sum Megafon hevur gjørt. Eftir henni høvdu andstøðuflokkarnir fingið 54,4 prosent av atkvøðunum, og stjórnarflokkarnir og teirra stuðulsflokkar høvdu fingið 45,6 prosent.

So langt frammanfyri hava teir vinstrasinnaðu flokkarnir ikki verið, síðan teir borgarligu vunnu stjórnarvaldið aftur í 2001.

Hjá Lars Løkke Rasmussen er kanningin ikki serliga hugaligur lesnaður. Vinstri hevði einans fingið 19,3 prosent, um fólkatingval var nú.



*– Hetta er fantastiskt. Tað eru slíkir dystir, tú nærmast bara torir at droyma um, men nú er tað veruleiki, sigur Eyðun Samuelsen,altjóða hondbóltsdómari, sum næsta vikuskifti skal døma dyst millum SG Flensburg-Handewitt og HC Bosna Sarajevo*

# Ein perla á Argjum

Tá ið kirkjuráðið á Argjum hevur fingið boð um, at øll formlig viðurskifti eru avgreitt, fara tey alt fyri eitt undir at fyrireika byggingina.

Tað sigur Bjartur Dalsgarð, formaður í kirkjuráðnum á Argjum eftir býráðsfundin í Havn í kvøld.

- Vit hava alla tíðina lagt dent á, at nýggja kirkjan á Argjum skal verða ein byggilistarlig perla og tað standa vit við, skoytir hann upp í.

Hann sigur í hesum sambandi, at ætlanin er ikki at skemma náttúruna við Sandá, tvørtur ímóti er ætlanin at leggja ein perlu afturat.

Akkurát, hvussu nýggja kirkjan fer at síggja út, veit hann ikki enn av teirri einføldu orsøk, at hon er ikki teknað enn.

Hann hevur áður sagt við Sosialin, at hann væntar, at kirkjuráðið fer at bjóða til kapping ímillum nakrar arkitektar um eitt uppskot til nýggja kirkju.

Og arkitektarnir fara at fáa at kalla fríar hendur - tó innanfyri eitt ávíst mark.

Í kirkjuráðnum hava vit umhugsað at kirkjan skal partvís verða bygd við úr gróti við flagtekju.

Hetta er fyri at kirkjan eisini skal verða ein varði yvir niðursetufólkini á Argjum, sum eisini vóru tiltiknir grótlaðarar.

Men tað er eisini ætlanin, at kirkjan skal kunna brúkast til onnur endamál enn gudstænastu, eitt nú til konsertir, og tí skal nógv leggjast fyri at fáa góð ljóðviðurskifti.

Les meiri um sama evni á síðu 4.

## Outlandish-sangari í Rex

Hetta vikuskiftið fer Isam B úr kenda danska poppbólkinum Outlandish at verða gestasangari í Rex í Havn.

Outlandish hava havt nakrar framførslur í Føroyum seinastu árini. Teir eru kendir fyri sín fleirmentaða popp og hava havt fleiri hitt á okkara leiðum. Teir eru upprunaliga úr Marokko, Honduras og Pakistan, men saman verða teir roknaðir sum ein danskur poppbólkur

Ein av sangarunum í bólkinum vitjar í Føroyum um vikuskiftið. Tað er Isam B, sum verður gestasangari í Rex leygarkvøldið. Hann fer at syngja nakrar sangir hjá Outlandish. Tá fer eisini Páll Finnur Páll at spæla, og Sebastian frá Paradise Hotel verður gestabarrvørður.




Rættarsalirnir eru gjørdir fullkomiliga av nýggjum

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Rættarfundir aftur í Dómhúsinum

**RÆTTURIN Umsitingin og deildirnar á Dómaraskrivstovuni flyta nú í bygningin, har rættarfundir í eina tíð hava verið, undir Glaðsheyggi**

Randi Jaobsen

Arbeiðið við at umvæla rættarsalirnar í Dómhúsinum er nú liðugt, og rættarfundirnir verða nú aftur hildnir í teimum.

Nú eiga hølini hjá umsitingini tørn at verða umvæld, og tí flytur øll umsitingin niðan Undir Glaðsheygg at vera, meðan umvælingararbeiðið fer fram.

Skrivstovurnar skulu umbyggjast og útbyggjast fyri at betra um umstøðurnar. Hetta er tiltrongt bæði fyri starvsfólkini og fyri brúkararnar.

Umvælingin er stórarbeiði, sum krevur samskipan og umlegging av dagligu arbeiðsmannagongdunum á Dómaraskrivstovuni.

Arbeiðið byrjar fyrst í mars.

